| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 20. juni 2007 |
| Býráðsfundur nr. | 08/2007 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2007 tann 20. juni kl. 17.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 14. juni 2007 um innkalling til fundar. Sambært e-posti til býráðslimirnar, dagfest 18. juni 2007 er fundurin fluttur frá kl. 16.30 til 17.30.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Petur Abrahamsen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Býráðið hevur móttikið teldupost frá Jón Nolsøe Olsen, dagfestur 19. juni 2007, hvar boðað verður frá, at hann av persónligum ávum ikki møtir á býráðsfundinum.

Signar á Brúnni hevur telefoniskt seinnapartin boðað borgarstjóranum frá, at hann ikki hevur møguleikar fyri at møta vegna forfall. Hann hevði við stuttum skotbrái fingið boð um at møta á skúlastýrisfundi í Klaksvík.

**Mál nr. 40/2007.**

**Mál viðvíkjandi mentanar/menningarleiðara.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 12. apríl 2007, broytt tann 07. juni 2007 um uppskot til stravslýsing eftir menningar- og mentanarleiðara (leiðara fyri menningar- og mentanardeildini), sum Fuglafjarðar býráð hevur samtykt at seta á stovn og játta pening til á fíggjarætlan kommununar fyri 2007.

Uppskotið er eisini latið fíggjarnevndini til viðgerðar og viðmerkingar.

Miðað verður fram ímóti at hava endaligu viðgerðina av málinum fyri á býráðsfundinum 21. juni 2007, og beint eftir avgerðina lýsa eftir leiðaranum til deildina. Miðað verður fram ímóti, at leiðarin kann byrja í starvinum 1. september 2007 ella skjótast eftir hetta.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt uppskotið um starvslýsing og starvsprofil á fundi tann 12. juni 2007 og gjørdi eitt nú sínar niðurstøður um at minka starvslýsingina, hetta sambært viðgerðini í fíggjarnevndini tann 18. apríl 2007, somuleiðis sum heitt verður á fyrisitingina og at gera hetta arbeiði, so ein endalig lýsing kann fyriliggja til fíggjarnevndarfundin 14. juni 2007

Nevndin mælir einmælt fíggjarnevndini/býráðnum til at taka undir við málinum og fyriligjandi tilfari um starvslýsing og starvsprofil av starvinum sum menningar- og mentararleiðari við starvssetan 01. september 2007, og at lýsingin, sum nú fyriliggur, verður sett í bløðini, so skjótt sum býráðið endaliga hevur gjørt sína samtykt við eini umsóknarfreist til 20. juli 2007.

Málið hevur somuleiðis verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 14. juni 2007, og mælir nevndin einmælt býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini frá 12. juni 2007.

Á fíggjarætlan kommununar fyri 2007 eru kr. 300.000,00 avsettar á konto 610050 til menningarleiðaran. Sostatt verður mett, at nóg stór peningajátttan er til starvsfólkaløn og rakstur av deildina annars inniverandi fíggjarár.

**Avgerð:**

Tilmælini frá mentamálanevndini og fíggjarnevndini vórðu samtykt. ( 7-0)

**Mál nr. 41/2007.**

**Mál viðvíkjandi broytan av byggisamtyktini fyri Kambsdal – víðkan av bústaðarøki.**

Tekniska nevndin hevur móttikið skriv frá borgarstjóranum, dagfest 16. mei 2007 um víðkan av bústaðarøki á Kambsdali, soleiðis at øki oman fyri ídnaðarøki verður broytt frá landbúnaðarøki "Øki K" til bústaðarøki "Øki B".

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 12. juni 2007, og tekur nevndin undir við uppskotinum og mælir býráðnum til, at tann partur av verandi landbúnaðarøki "Øki K", sum er skraveraður á hjálagda korti, verður broyttur til bústaðarøki "Øki B".

**Avgerð:**

Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (7-0).

**Mál nr. 42/2007.**

**2. viðgerð av eykajáttan til verju á fornminnunum á Oyruni við Gjógará.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Føroya fornminnissavni, dagfest 12. apríl 2007, hvar greitt verður frá ástaðarfundi á Oyruni tann 27. mars 2007 kl. 10.00-12.00 millum umboð fyri kommununa og savnið.

Sambært skrivinum, sum annars er sent øllum býráðslimum í avriti, verður mælt kommununi til skjótast at gera eina verkætlanarlýsing av verjutiltakinum og kostnaðarmeting. Grótverjan eigur at verða gjørd frá brúnni oman við Gjógvará oman til ávísan stein áraka nýggja grótkastið við hornið á Oyruni. Haðani eigur laðingin at verða sneidd norður til áðurnevnda horn á Oyruni.

Laðingin eigur at verða so lág sum til ber, tó ikki hægri enn 70 cm. upp frá nevnda hornasteini oh laðað úr gróti, sum liggur har í lendinum.

Kommunan verður at rinda kostnaðin av tiltakinum, men eigur umsókn um stuðul til verjutiltakið at verða send Fornminnissavninum. Sambært skrivinum og fráboðan á staðnum er ikki óhugsandi, at stuðul kann verða veittur av kontoini "Friðað hús og fornminnir" til endamál sum hetta.

Mentamálanevndin hevur móttikið skriv frá teknisku deild kommununar, dagfest 11. mei 2007, hvar mett verður, at arbeiðið sum Símun Arge, fornfrøðingur mælir til at gera kemur at kosta umleið kr. 410.000,00. Talan er um laðingina frá brúnni um Gjógvará og yvir til omankoyringina, sum víst á hjálagda korti yvir økið. Nýttar eru kr. 82.000,00 til hetta arbeiðið í 2006, meðan avsettar eru kr. 25.000,00 í 2007 á konto 310115 "Víkingatoftir!".

Sostatt er eykafíggjartørvurin til hetta arbeiði inniverandi fíggjarár kr. 303.000,00.

Verður strekkið frá omankoyringini og norður til fyrsta neyst gjørt sum vanlig verja móti sjóvarmálanum, har bakkin verður klæddur við gróti hall 1:1,25, metir tekniska deildin, at kostnaðurin av hesum arbeiði verður mettur til kr. 30.000,00, havandi í huga, at arbeiðið tá kann verða gjørt við kommunalum amboðum.

Verður arbeiðið gjørt á saman hátt sum heimanfyri omankoyringina á Oyruni við grótlaðing verður mett, at kostnaðurin verður umleið kr. 300.000,00. Hetta øki er striplað á kortinum.

Sostatt verður talan um ein eykakostnað upp á kr. 303.000,00, um grótlaðing verður framd frá brúnni við Gjógvará og yvir til omankoyringina á Oyruna, kr. 333.000,00 um talan verður laðing frá brúnni til omankoyringina víðari við vanligari verju móti fyrsta neysti, meðan kostnaðurin verður umleið kr. 603.000,00, um alt arbeiðið verður gjørt við vanligari grótlaðing á øllum strekkinum.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 22. mei 2007, og mælir fíggjarnevndini/býráðnum til, at alt arbeiðið verður gjørt við grótlaðing av verandi grótlaðara frá brúnni við Gjógvará og til omankoyringina til Oyruna, somuleiðis sum heitt verður á fíggjarnevndina um at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan upp á kr. 303.000,00 til arbeiðið í inniverandi fíggjarætlan.

Mælt verður eisini fíggjarnevndini/býráðnum til at søkja Føroya fornminnissavn um stuðul til arbeiðið, hetta vísandi til skriv frá savninum, dagfest 12. apríl 2007 og frágreiðingini frá teimum á ástaðarfundinum 27. mars 2007.

Fíggjarnevndin hevur móttikið tilmæli frá mentamálanevndin, dagfest 22. mei 2007, har nevndin á fundi sama dag hevur mælir fíggjarnevndini/býráðnum til, at alt arbeiðið verður gjørt við grótlaðing av verandi grótlaðara frá brúnni við Gjógvará og til omankoyringina til Oyruna, somuleiðis sum heitt verður á fíggjarnevndina um at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan upp á kr. 303.000,00 til arbeiðið í inniverandi fíggjarári.

Somuleiðis verður eisini mælt fíggjarnevndini/býráðnum til at søkja Føroya fornminnissavn um stuðul til arbeiðið, hetta vísandi til skriv frá savninum, dagfest 12. apríl 2007 og frágreiðingini frá teimum á ástaðarfundinum 27. mars 2007.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 23. mei 2007 og tekur undir við tilmælinum frá mentamálanevndini, og mælir býráðnum til at veita eina eykajáttan til arbeiðið upp á kr. 303.000,00 í inniverandi fíggjarári til arbeiðið, hetta sambært § 41, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri.

Vísandi til § 41, stk. 2 í somu lóg verður mælt til, at eykajáttanin kr. 303.000,00 verður fíggjað av konto 222035 í bólki 2 "Havnagerð", har avsettar eru kr. 9,0 mió í 2007., somuleiðis sum íløgan í garðin til verju av Víkingatoftunum verður skrásett undir íløgum í bólki 2 konto 222031 "Verjugarður Víkingatoftir", t.v.s. í sama íløgubólki sum havnagerðin. Sostatt er bert talan um umflyting av íløgujáttan í bólki 2.

Tá ið talan er uim eina eykajáttan, sum hóasty alt í hesum føri ikki ber eykaútreiðslur við sær, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, herra sambært § 41, stk. 2 í kommunustýrislógini, og skal avgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar eftir samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 04. juni 2007 og vórðu tilmælini frá mentamálanevndini og fíggjarnevndini samtykt. (5 atkv. fyri og 3 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni, Petur Abramsen og Jóhan Hansen). Samtykt varð somuleiðis at beina málið um eykajáttan til 2. og endaliga viðgerð á almenna býráðsfundinum í juni. (5 atkv. fyri og 0 atkv. ímóti).

**Avgerð:**

Samtykt varð við 2. og endaligu viðgerð av veita eina eykajáttan til arbeiðið sambært tilmæli frá fíggjarnevndini frá 23. mei 2007. (5 atkv. fyri og 2 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Tórfríður Abrahamsen og Petuir Abrahamsen).

**<u>Mál nr. 43/2007.</u>**

**Viðvíkjandi eykajáttan til økið "Oljubryggjan" konto 222088.**

Í 2006 samtykti býráðið at játta kr. 12.500.000,00 til íløgu í nýggja oljubryggju á Enninum.

Tá ið fíggjarætlanin fyri 2007 var til viðgerðar boðaði tekniska deild kommununar fíggjarnevndini frá, at oljubryggjan helst ikki varð liðug í 2006, og at umleið kr. 2,5 mió. tí áttu at verið fluttar frá fíggjarárinum 2006 til 2007.

Hetta varð gjørt soleiðis, at játtanin upp á kr. 2,5 mió av teimum upprunaligu kr. 12,5 mió. vórðu fluttar fram til 2007, og skuldu verða fíggjaðar av innistandandi peningi, tí peningurin varð tøkur til endamálið.

Sjálv bryggjan er liðug, men enn væntar at leggja vatnrør á økið, nakað av planeringsarbeiði og asfaltering. Hetta arbeiðið er mett at kosta umleið kr. 1,5 mió., og hevur málið verið umrøtt í býrásleiðsluni.

Býráðsleiðslan hevur sambært reglugerðina um fíggjarstýring av kommununi § 3,1 sent málið til havnanevndina til viðgerðar, somuleiðis sum heitt verður á nevndina um at koma við tilmæli til fíggjarnevndina, so málið kann verða lagt fyri býráðið til avgerðar, um veitast skal ein eykajáttan til arbeiðið, sum sambært § 3,5 í reglugerðini kann verða fíggjað av innistandandi peningi, lántøku, meirinntøkum ella við umflytingum av játtan á íløgukontobólkinum undir Fuglafjarðar havn.

Havnanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 14. juni 2007 og mælir nevndin til, at arbeiðini verða gjørd í 2007, og at heitt verður á fíggjarnevndina um at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan upp á kr. 1,5 mió til arbeiðið í inniverandi fíggjarári.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt tilmæli frá havnanevndini á fundi 14. juni 2007, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 1,5 mió. til arbeiðið við liðuggerð av oljubryggjuni í inniverandi fíggjarári, hetta sambært § 41, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri.

Vísandi til § 41, stk. 2 í somu lóg og § 3,5 í reglugerð um fíggjarstýring av Fuglafjarðar kommunu verður mælt til, at eykajáttanin kr. 1,5 mió. verður fíggjað av konto 222035 í bólki 2 "Havnagerð", har avsettar eru kr. 9,0 mió. í 2007. Sostatt verður talan um eina umflyting í bólki 2 millum konto 222035 og 222088 upp á nevndu upphædd.

Sostatt er bert talan um umflyting av íløgujáttan í bólki 2.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, sum hóast alt í hesum føri ikki ber eykaútreiðslur við sær, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í insta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í kommunustýrislógini, og skal avgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar eftir samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í somu lóg.

**Avgerð:**
Tilmælini frá havnanevndini og fíggjarnevndini um liðuggerð av Ennibryggjuni við uttanumøki varð samtykt. (7-0). Somuleiðis varð samtykt at beina málið um eykajáttanina til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi ella eykabýráðsfundi. (7-0).

**<u>Mál nr. 44/2007.</u>**

**Viðvíkjandi eykajáttan til økið "Lærararstovan vm." konto 445040.**

Skúlabygginevndin hevur á fundi tann 14. juni 2007 viðgjørt yvirlit yvir kostnað av omanfyri nevnda arbeiði saman við Jákup Paula Johannesen, arkitekti frá Fuglø arkitektum, 700 Klaksvík.

Avsettar eru kr. 400.000,00 til arbeiðið í 2007 á konto 445040, men sambært yvirlitinum hjá Jákup Paula verður kostnaðurin:

| | |
|---|---|
| Sambært skjal: | kr. 1.052.597,89 |
| + restkeyp av innbúgvi umleið | kr. 108.000,00 |
| + skiftan av vindeygum og nýggj skáp til fuglarna | kr. 89.402,11 |

Íalt umleið ***kr. 1.250.000,00***.

Skúlabygginevndin heitir í skrivi, dagfestum 14. juni 2007 á mentamálanevndina um at viðgera hetta mál, sum ber eina eykajáttan við sær upp á kr. 850.000,00, so arbeiðið kann verða gjørt í summarfrítíðini.

Býráðsleiðslan hevur sambært reglugerðina um fíggjarstýring av kommununi § 3,1 sent málið til mentamálanevndina til viðgerðar, somuleiðis sum heitt verður á nevndina um at koma við tilmæli til fíggjarnevndina, so málið kann verða lagt fyri býráðið til avgerðar, um veitast skal ein eykajáttan til arbeiðið, sum sambært § 3,5 í reglugerðini kann verða fíggjað av innistandandi peningi, lántøku, meirinntøkum ella við umflytingum av játtan á íløgukontobólkinum undir Fuglafjarðar skúla.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 14. juni 2007 og mælir nevndin til, at arbeiðini verða gjørd í 2007, og at heitt verður á fíggjarnevndina um at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan upp á kr. 850.000,00 til arbeiðið í inniverandi fíggjarári.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt tilmæli frá mentamálanevndini á fundi 14. juni 2007, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 850.000,00 til arbeiðið í sambandi við umbygging av lærarastovuni o.ø. í inniverandi fíggjarári, hetta sambært § 41, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri og skrivi frá skúlabygginevndini, dagfest 14. juni 2007.

Vísandi til § 41, stk. 2 í somu lóg og § 3,5 í reglugerð um fíggjarstýring av Fuglafjarðar kommunu verður mælt til, at eykajáttanin kr. 850.000,00 verður fíggjað av konto 445010 í bólki 4 "Skúlin nýíløgur, har avsettar eru kr. 2,1 mió. í 2007. Sostatt verður talan um eina umflyting í bólki 4 millum konto 445010 og 445040 upp á nevndu upphædd.

Sostatt er bert talan um umflyting av íløgujáttan í bólki 4.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, sum hóast alt í hesum føri ikki ber eykaútreiðslur við sær, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í insta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í kommunustýrislógini, og skal avgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar eftir samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í somu lóg.

**Avgerð:**
Tilmælini frá mentamálanevndini og fíggjarnevndini um gerð av arbeiðinum við umbygging av lærarastovuni vm. í 2007 vórðu samtykt. (7-0). Somuleiðis varð samtykt at beina málið um eykajáttanina til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi ella eykabýráðsfundi. (7-0).

**<u>Mál nr. 45/2007.</u>**

**Mál viðvíkjandi keypi av lendi og seyðhúsi á Mørkini.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Mortani Joensen, bónda, dagfest 06. desember 2005 um møguligt keyp av lendi og seyðhúsi á Mørkini.

Hetta mál hevur áður verið til viðgerar í teknisku nevndini og í fíggjarnevndini.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 20. februar 2007 viðgjørt hetta mál og heitir á teknisku nevndina um at koma við yvirliti yvir vídd og kostnað fyri at keypa lendið og seyðhús.

Økið, talan er um, er tilsamans umleið 34.687 m2 og av hesum eru umleið 12.447 m2 veltur bøur og umleið 22.240 m2 ódyrkað. Sum nú er, verður hetta lendið nýtt til vetrarbit til seyðin, sum hann tekur heim úr Halgadali um veturin.

Tingingar hava verið við Mortan Joensen, um møguleiki er fyri, at kommunan og eigarin kunnu gera avtalu um, at kommunan yvir eitt ávíst áramál keypir ognina fyri ein avtalaðan prís og verður eigari av tí lutfalli til eina og hvørja tíð, goldið er fyri. Sambært upplýsningum, Mortan hevur frá stjóranum á Búnaðarstovuni, halda teir ikki nakran trupulleika verður í at gera eina slíka avtalu.

Vísandi til skriv frá Búnaðarstovuni, dagfest 29. mei 2007 viðvíkjandi áseting av prísi fyri lendi, hevur Mortan skotið upp, at alt lendið verður keypt fyri ein meðalprís upp á kr. 75,00 fyri m2, og at endurgjaldið fyri húsið verður kr. 1,0 mió.

Sambært hesum verður samlaði kostnaðurin:

| | |
|---|---|
| Lendið 38.500 m2 á kr. 75,00 | kr. 2.601.525,00 |
| Bygningur við atkomuvegi | kr. 1.000.000,00 |
| Samlaður kostnaður: | kr. 3.601.525,00 |

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 08. juni 2007, og mælir nevndin býráðnum til, at kommunan ger avtalu við eigaran um, at ognin verður keypt yvir eitt 10 ára skeið. Skeytið verður gjørt soleiðis, at eigaraparturin hjá Fuglafjarðar kommunu verður øktur við einum 10. parti um árið. Gjaldið verður kr. 360.152,00 yvir 10 ár.

Um kommunan tekur avgerð um at nýta meira av økinum, enn kommunan er ánari av, skal hon hava rætt at ogna sær neyðugt lendi og gjalda fyri tann partin, sum tørvur er á.

Málið hevur somuleiðis verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 14. juni 2007, og mælir nevndin einmælt býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevndini, og at ein møgulig avtala, sum gjørd skal verða við Mortan Joensen og Búnaðarstovuna tekur við tann 01. januar 2008.

**Avgerð:**

Tilmælini frá teknisku nevndini og fíggjarnevndini vórðu samtykt. (7-0).

**<u>Mál nr. 46/2007.</u>**

**Viðvíkjandi brúgv um Skarðsá.**

Í sambandi við íbinding av vegastrekkinum Traðarvegur og Norður í gerði eru gjørd 3 uppskot um vegaføring um Skarðsá, eitt við rundkoyring og 2 uttan rundkoyring.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 10. mei 2007, og mælir nevndin býráðnum til, at vegaføringin við Skarðsá verður gjørd sambært uppskoti nr. P1 uttan rundkoyring, og at atkoman til skúlan verður flutt.

Somuleiðis mælir tekniska nevndin til, at peningurin, sum avsettur er til ovaru Skarðsá verður brúktur til hesa vegaføring.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 04. juni 2007 og varð samtykt at taka tað av skránni, fyri at fáa eina kostnaðarmeting gjørda yvir arbeiðið til komandi almenna býráðsfundin, sum framskundaður er til 21. juni 2007.

Sambært kostnaðarmeting frá teknisku deildini, dagfest 08. juni 2007 verður samlaði kostnaðurin av vegtaføringini uttan rundkoyring kr. 1.413.961,40.

**Avgerð:**

Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá teknsiku nevndini frá 10. mei 2007. (7-0).

**<u>Mál nr. 47/2007.</u>**

***Viðvíkjandi vali av nýggjum limi í bygginevndina við Fuglafjarðar skúla.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Dánjali Vang, dagfest 27. mei 2007, har hann mælir til at velja Elisabeth D. Eldevig sum lim í bygginevndina við Fuglafjarðar skúla í staðin fyri seg.

Í hesum sambandi verður víst til § 36, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, har býráðið á fundi tann 12. apríl 2007 hevur samtykt at velja eina serstaka bygginevnd til at taka sær av arbeiðinum við at hava eftirlit við um- og útbygging av skúlanum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 12. juni 2007 og mælir nevndin einmælt býráðnum til at velja Elisabeth D. Eldevig, forkvinnu í mentamálanevndini sum lim í bygginevndina fyri Fuglafjarðar skúla frá 21. juni 2007 at rokna.

**Avgerð:**

Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (7-0).

**<u>Mál nr. 48/2007.</u>**

**Leigusáttmáli við P/F K.J. Hydraulik á havnarøkinum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Advokatskrivstovuni, dagfest 27. apríl 2007 um leigusáttmála fyri økið undir smiðjubygninginum, sum SP/F Fuglafjarðar mekaniski verkstaður var eigari av, nevniliga matr. nr. 239y.

Spurt verður, um møguleiki er fyri at fáa nýggjan leigusáttmála, sum hevur longri uppsagnarfreist, soleiðis at viðurskiftini kunnu normaliserast í sambandi við, at SP/F Fuglafjarðar mekaniski verkstaður er undir likvidatión.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini tann 14. juni 2007, og mælir nevndin býráðnum til, at fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála verður gjørt við P/F K.J. Hydraulik og verður galdandi í 5 ár.

**Avgerð:**

Tilmæli frá havnanevndini varð samtykt. (7-0).

**<u>Mál nr. 49/2007.</u>**

**Leigusáttmáli fyri bygningin á matr. nr. 239n á havnarøkinum.**

Víandi til fundarfrásøgn millum umsitingina og Beinir Nolsøe Olsen tann 11. juni 2007 verður biðið um, at leigusáttmálin viðvíkjandi bygninginum á matr. nr. 239n á havnarøkinum verður gjørdur við SP/F MBT, 530 Fuglafjørður, og at hesin verður galdandi í 5 ár.

Sáttmálin við Beinir Nolsøe Olsen hevur verið galdandi í 3 ár.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini tann 14. juni 2007, og mælir nevndin býráðnum til, at fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála verður gjørt við SP/F MBT og at hesin verður galdandi í 3 ár.

**Avgerð:**

Tilmæli frá havnanevndini varð samtykt. (7-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.55.

| | |
|---|---|
| Jann Toftegaard | Petur Abrahamsen |
| Dánjal Vang | Sigurð S. Simonsen |
| Elisabeth D. Eldevig | |
| Eyðun á Lakjuni | |
| Tórfríður Abrahamsen | //Jákup Frants Larsen<br>býráðsskrivari |